Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og fiskivinnumálum

Evni: Tøk vaktar- og bjargingarskip

Spurningar:

1. Er tað rætt skilt, at hvørki Brimil ella Tjaldrið eru tøk sum vaktar- og bjargingarskip í løtuni?
2. Um so er, hvussu leingi fer henda støðan at vera, og metir landsstýrismaðurin tað vera nøktandi?
3. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi bjarging og eftirliti kring Føroyar nú og í komandi tíðum?

Viðmerkingar:
Føroysku vaktar- og bjargingarskipini Brimil og Tjaldrið hava stóran týdning fyri okkum sum fiskivinnutjóð bæði í sambandi við eftirlit og bjarging. Samstundis eru hesi skipini eisini týdningarmikil í sambandi við luttøkuna hjá Føroyum í verju- og trygdarspurningum.

Semja tykist vera um, at annað skip eigur at koma fyri Tjaldrið, sum er meira enn 50 ára gamalt, men enn eru ikki ítøkilig stig tikin.

Tí hevur Brimil í størri mun verið álitið hjá Vørn. Tó hevur verið greitt í eina tíð, at Brimil ikki fór at vera tøkur partar av hesum árinum, og ikki er tað í løtuni.

Nú frættist, at Tjaldrið heldur ikki er tøkt sum vaktar- og bjargingarskip í løtuni.

Á Løgtingi, 21. august 2026

Eirikur í Jákupsstovu